Uppskotið kostaði ov nógv

– Stytta vit sáttmálaskeiðið so er tað ein skeiv leið at ganga, sigur Bárður Nielsen

Hóast landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur vrakað semingsuppskotið frá semingsmonnunum, merkir tað ikki, at verkbann er galdandi

VERKFALL

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, hevur vrakað semingsuppskotið, sum semingsstovnurin legði fyri Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Orsøkirnar eru tað stutta tíðarskeiðið og lønarhækkanin, skrivar heimasíðan hjá Fíggjarmálaráðnum.

Ein eitt ára sáttmáli er ov stuttur og gevur hvørki stabilitet ella frið á arbeiðsmarknaðinum.

– Vit hava heldur arbeitt fram ímóti at fáa sáttmálaskeiðini longri, tí so er friður á arbeiðsmarknaðin í longri tíð, og tað merkir samstundis stabilitet.

– Hinvegin, at stytta sáttmálatíðarskeiðið er ein skeiv leið at halda, sigur Bárður Nielsen.

Skuldi lønarhækkanin í semingsuppskotinum verið galdandi fyri allan almenna sektorin, hevði tað kostað landskassanum ov nógv, tá ið hugsað verður um samfelagsbúskapin og hallið í landshúsarhaldinum komandi ár.

– Alternativið til lønarhækkan er at avmarka talið á almennum størvum, og tað er neyvan ynskiligt, sum búskaparligu vánirnar eru.

– Fíggjarmálaráðið var og er framvegis sinnað at samráðast víðari, so at ein semja kann verða funnin, sigur Bárður Nielsen.

sb.

Ritan er í sigling, men Smyril 1 liggur

Strandferðslan nærum lamin

Við arbeiðssteðginum, sum lýstur varð hósdagin kl. 14, vórðu flestu av skipunum hjá Strandferðsluni løgd.

Fýra skip vórðu løgd beinanvegin – Smyril 1, Ternan, Sam og Teistin – meðan Sildberin varð lagdur í gjáramorgunin.

Dúgvan er ikki í sigling í løtuni orsakað av teknisk-um trupulleikum.

Eitt slíkt verkfall rakar altíð útjaðarin meinast, men í so máta verða fleiri av hesum fólkunum ikki rakt av verkfallinum, tá talan er um dagliga sambandið við umheimin.

Her er talan um tey sum dagliga eru tengd av samfersluni við Rituni, Másanum og Súluni.

Hinvegin so koyra Bygdaleiðir sum vanligt.

sb.

1100 fólk í verkfalli

Kl. 8 hósmorgunin løgdu semingsmenninir Jógvan Amonsson og Alfred Petersen fram semingsuppskot í sáttmálatrætuni millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.
Starvsmannafelagið góðtók semjuna, meðan Fíggjarmálaráðið vrakaði semjuna. Sostatt er eingin sáttmáli galdandi á økinum, fyri teir limirnar í Starvsmannafelagnum, sum arbeiða á sáttmálaøkinum hjá Fíggjarmálaráðnum.

Harvið er verkbann, og allir limir á sáttmálaøkinum, uttan undantak, fóru tí til hús henda dagn.

Ialt snýr tað seg um eini 1100 fólk.

sb.

Tolleftirlit sum vanligt

Hóast onkur kundi hildið, at fólk nú frítt kunnu taka ólógligar vørur við sær umvegis flogvøllin, so er tað ikki so.

Starvsfólkini á Tolleftirlitinum í Vágum eru til arbeiðis sum vanligt á flogvøllinum, og eru ikki ávirkað av verkfallinum.

Starvsfólkini eru nevniliga tænastufólk, og tí ikki fevnd av arbeiðssteðginum.

sb

Sett í tómgongd fyri 1 %

- Arbeiðssteðgurin kann gerast ein skaðilig tómgongd, sigur borgarstórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen

– Tá ið munurin er so lítil, sum hann er hesaferð, verða avleiðingarnar av einum arbeiðssteðgi ógvuliga seint, um nakrantíð innafturvunnir, sigur borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen í eini viðmerking, sum verur prentað í fullum líki aðrastaðni í blaðnum.

Hann sigur, at hann er ikki beinleiðis partur av samráðingunum og hevur tí heldur ikki neyðuga innlitið í málið. Hann vil tí heldur ikki geva nøkrum ávísum parti skuldina fyri henda arbeiðssteðgin.

– Men eg loyvi mær at ivast í, um partarnir eru greiðir yvir, hvussu stóran ampa ein arbeiðssteðgur er fyri útjaðarin í Føroyum.

– Vóru partarnir greiðir yvir tað, høvdu teir neyvan lagt landið lamið á henda hátt fyri eitt prosent í lønarósemju, sigur borgarstjórin. Hann heitir tí á báðar partar um at gera sítt til at ein loysn verður funnin.

– Longur tit drála, størri verður skaðin, sigur hann, samstundis sum hann óttast fyri at hesin arbeiðssteðgurin kann gerast til eina skaðiliga tómgongd, ið kann elva til at stór samfelagsvirði fara fyri skeyti.

sb.

PILATES & MOTIÓN VEKTKONTROL

AEROBIC- INSTRUKTØR GUÐRUN MALENA HANSEN
er útbúgvin Pilates-instruktør & Aerobic- instruktør og hevur undirvíst í Føroyum og í Danmark

Venjingar í Pilates, motión og vektkontrol verða í Leirvíkar - skúla
hvønn fríggjadag kl.18.30-19.30 - 21. okt. til jóla (10 vikur)
hvønn leygardag kl.11.00-12.00 í Losjuni í Gøtu - 22. okt. til jóla (10 vikur)

SLIMLIFT
Klænka - tú fært ein sterkan og flatan búk.
-Styrkja vøddarnar - læra teg at brúka kroppin rætt - Betra kropsburðin - Betra smidleikan - Betra javnvágina - fáa góða heilsu

Øll eru vælkomin. Kostnaður 600 kr. pr. skeið
Hetta er fyri allan aldursbólk ung sum eldri

Avmarkað luttøka

Seinasta freist at gjalda fyri skeiðið er 20.oktober
Tekning á tel. 585585 / 442166 / 273164
Tú kanst eisini senda eitt sms á 273164.
Ella á teldupost: pilates@kallnet.fo

NÝTT SKEIÐ NÝTT SKEIÐ

Vit síggjast

SECONDHAND CD, DVD OG VHS
MUSIC - MOVIES
SVERRISGØTA 9, 2. HÆDD · 100 TÓRSHVN · TEL 320 911 · FARTEL 27 18 27